## DAGSINS MEINING

# Innanhýsis stríð

Samgongan er eitt hús í split við seg sjálvt. Tað frættist at kalla bert um klandur og um ósemjur, meðan púrt einki konstruktivt kemur frá landsstýrinum. Hetta er ein løgin støða, serstakliga tá hugsað verður um, hvussu nógv orka varð løgd í at fáa júst hesa samgongu upp á føtur. Samgonguskjalinum trýtur ikki føgur orð og stór mál, men í politiska gerandisdegnum sæst lítið og einki til hesi mál. Her druknar alt í klandri, maktkampum millum flokkar og innanflokka.

Um nakrar dagar kemur fíggjarlógin á tingborð. Tá verður spennandi at síggja, um samanhangur er millum tey føgru orðini og tølini á fíggjarlógini. Eitt er vist: skulu tey gyltu lyftini haldast, so má fíggjarlógin hækka munandi longu frá 1. januar í 2003 og restina av valskeiðinum. Tað verður ikki minni spennandi at síggja, um minkaði blokkurin fer at ávirka alt hetta. Fíggjarmálaráðharrin vil vera við, at minkaði blokkurin als onga ávirkan hevur á komandi fíggjarlógina.

Tað verður áhugavert at síggja, hvussu hann loysir tann knútin. Tí hvussu hann so vendir og snarar hesum máli, so eru út við 400 milliónir úti av almenna búskaparliga renslinum. Hesar skulu útvegast so ella so, samstundis sum pláss skal vera fyri øllum teimum gyltu lyftunum frá samgonguskjali og valstríði. Fullveldið er lagt á hyllina fyri hetta valskeiðið, men samstundis er boðað frá stórum yvirtøkum, nýggjum ætlanum, stórum íløgum og skattalættum. Her hongur ikki saman. Her kann ikki vera nóg mikið til allar landsstýrismenn og teirra øki. Man tað ikki vera her, at ein orsøkin til klandrið er at finna? Tá krubban er tóm, býtast hestarnir sigur eitt gamalt orð.

Kemur fíggjarmálaráðharrin hinvegin við eini fíggjarlóg, ið er økt samsvarandi lyftunum í samgonguskjalinumn, so er tað møguligt, at gongd kemur á politiska arbeiðið, ið higartil hevur ligið púra stilt. Men við minkaðum blokki gerst hetta ikki uttan skattahækkingar. Tað er torført at hugsa sær, at als einki skal henda, og tí velur fíggjarmálaráðharrin ivaleyst skattahækkingarnar í hesum umfari. Vit eru fyrst í einum valskeiði, og hann kann vóna, at veljararnir gloyma lyftini um skattalættar, móti at nakað munagott hendir á øllum samfelagsøkjum her og nú. Tørvurin er ómetaligur, tí so nógv hevur ligið á láni hesi seinastu fýra árini, orsakað av hansara sera konservativa fíggjarpolitikki.

Tað fíggjarmálaráðharrin ræðist mest er, at veljararnir skulu fáa ta fatan, at politiska deyðavatnið stavar frá minkanini í blokkinum. Tí má hann handla nú og koma við eini nógv øktari fíggjarlóg, sjálvt um hetta er í mótstríð við politikkin hjá sterkasta samgongufloKkinum, fólkaflokkinum. So kunnu vit kanska vænta eina symbolska skattalækking móti vali aftur. Livst so spyrst. Klandrið man tó fara at halda fram, tí orsøkirnar eru nokk ikki bara tann tóma krubban. Her eru onnur mál, sum skilja, og tað fara vit at venda aftur til seinni.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Útferð í Eysturoynna

**Palli Dalsgaard**



Sunnudagin 14. sept. gjørdi Sandoyar Sýslu Ferðalag útferð við bussi av Sandi inn í Eysturoynna. Veðrið var gott, dimmviðrað men turt fyri tað mesta. Farið var av Sandi til Skopunar, har nøkur av ferðalagnum komu við, síðan við Teistanum um fjørðin. Í Havn var eisini onkur, sum hevði áhugað fyri hesi útferð. Tá alt fólkið var samlað, vit vóru 21 í tali, var ikki steðgað á fyrr enn í gamla Próstagarðinum úti á Nesi. Fyri okkum, sum ikki høvdu verið har áður, tað vóru tey allar flestu, var hendan vitjan áhugaverd. Hugsa sær til, at tá hesi húsini vóru bygd, vóru tey næststørstu hús í Føroyum, einans Amtmannsborgin var størri. Inni har fingu vit nógv at síggja og vita, blíðskapurin var góður, oman á fingu vit kaffi, te og vælsmakkandi køkur.

Av Nesi koyrdu vit til Æðuvíkar. Tey, ið har búgva, eru fyri ikki so langari tíð síðan heiðrað fyri væl hildna bygd, tað er hon eisini. Tá man sær alt tað sléttlendi, ið har er, er væl hugsandi, at menn, ið hava havt hug til at velta upp úr nýggjum, hava búsett seg har. Lendið hevur verið dragandi á so mangan hátt.

Úr Æðuvík gekk leiðin til Runavíkar, har fingu vit ein góðan døgurða á John's Restaurant. Síðan til Leirvíkar, har vit vitjaðu Báta- og Málningasavnið. Savnið er í einum stórum húsum niðri á bryggjuni, ið hevur verið pakkhús, og vísir seg at vera væl egnað til endamálið. Har er nógv áhugavert at síggja, eisini har var fólk, ið greiddu frá tí, ið inni var.

Við havnarlagið í Leirvík var so reint og ruddiligt, at tað kundi eingin gestur lata vera at bíta merki í.

Seinasta savnið, vit vitjaðu, var í Fuglafirði, har vóru vit inni í Piddasa handli og Riberhúsi, har eisini var áhugavert, eins og í teim plássum, vit høvdu verið í frammanundan, og har fekk tú eisini ta vitan, tú vildi hava.

Á loftinum í Riberhúsi keyptu vit okkum kaffi og køkur. Riberhús er pakkhúsið, sum hoyrir til handilin. Navnið fekk pakkhúsið av skipinum, sum førdi vøru til handilin. Skipið at »Riberhus«.

Úr Fuglafirði koyrdu vit til Elduvíkar, so gekk leiðin aftur til Havnar, har tey fólkini, sum komin vóru haðani, vórðu sett av, og so á Gomlurætt. Eg fór úr Skálavík kl. 7.00 á morgni og var aftur við hús kl. 20.00, ein langur men væl eydnaður dagur.

Hvør livir til næsta ár vita vit ikki. Men at túrurin næsta ár, um hann verður gjørdur, verður vestur í Vágar og ikki endar fyrr enn í Gásadali er lítið at ivast í.

# Til Føroya Sílaveiðufelag og aðrar, um so er at teir eru

**Sólvit Simonsen**



Eg sat á einum stóli og lurtaði eftir útvarpinum, kemur ikki útvarpsmaðurin og fortelur okkum, at sílaveiðufelagið hevur klagað um aling á Sands vág. Eg ivist stórliga í, um hetta eru edrúir menn, ið hava klagað. Eg veit onki annað um nú í nógv harrans ár, enn at ymsar kanningar eru gjørdar av Sands vatni, tí ongi síl hava verið í vatninum. Og nú skal tað knappliga vera ein aliringur, sum liggur langt úti á Sands vág, ið forðar sílum í at koma niðan í vatnið. Eg kundi tonkt mær at vita, hvat Sílaveiðufelagið og maðurin, ið nevndur bleiv í útvarpinum, hava at bjóða okkum ístaðin fyri smoltalingina. Eitt felag søkti um at fáa aling á Sands vág, men tað kundi ikki lata seg gera, tí landsstýrið hevði lagt Sandoynna av til smolt burturav. Hetta fekk kommunan á Sandi greið boð um, og mátti hon tí taka av tilboðnum, sum nú er, og tað eiga teir at standa við. Í turkinum í summar hendi tað, at áin úr Sands vatni var heil, so sum ofta hendir, og tá sigur tað seg sjálvt, at ikki er svimjandi hjá sílum eftir sandinum. Tá stóðu sílaveiðumenninir hendur í lumma og søgdu »keðiligt« ístaðin fyri at taka og grava ánna, tá stóðu síl uttan fyri og bíðaðu eftir at áin skuldi renna; men tey apaðust ikki upp á nakran aliring.

Síðan hendi tað, at tá ið áin fór at renna, breyt hon sær veg heilt yvir undir bakkanum, og er har sera grunt og hart lendi, so hetta gevur trupulleikar hjá sílum at sleppa niðan.

Annars er at siga, at í mínum ungu árum bleiv áin grivin av ungdóminum. Hetta komst av, at spælipláss var á sandinum oman fyri Mølheygarnar, so tá ið áin var heil, fleyt inn á plenuna og so maður av húsi við spaka at grava ánna. Vit savnaðu pengar saman at gera spæliplássið í stand við, væl gekk, vit áttu nógvan pening, men tá ið skuldi farast til verka, kom yvirfriðingarnevndin úr Havn og noktaði okkum at hava spæliplássið; men at tað var nógvar ferðir vakrari tá enn ruinurnar nú eru, tað minnast sandingar væl og eru sera skuffaðir.

Nú sær aftur út, sum at nakrir rík menn úr Havn aftur skulu koma her og forða okkum vinnuvegin, men her eiga tit at halda fingrarnar vekk og lata okkum fáa frið.

Fyrst í aliringurin kom var tað grindin, ið skuldi ræðast, grindin hevur verið, og tað hevur ongin grindarakstur verið betri enn tað sama.

Annars samanumtikið eru tit sera væl komnir til Sands, bæði at fiska og at vitja; men soleiðis at taka broddin av okkum, nei góðin, tað verður ikki.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:** Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Svar til "Tómhentur syndari" Dimmalætting 11 sep. 02

**Filip G.D.Hansen**
*520 Leirvík*

Táið vit taka ímóti gávu Guds, ið er at vera frelstur frá fordøming, ja tá ræður um at vera tómhentur, og taka ímóti hesi dýrabaru gávu !

Men tá tað snýr seg um Heilaggering teirra trúgvandi, so ræður um at hyggja framm ímóti lønini ! tí ein dag skulu øll, sum hava sett sítt álit á Jesus Kristus, koma fram fyri dómstól Hansara, har skal koma framm í ljósi alt tad sum var dult - jú tað er satt, at vit eru frelst frá fordøming, tí skriftin sigur at eingin fordøming er fyri tey sum í Kristi Jesusi eru og at vit ikki skullu koma til dóms, men her er talan um at vit ikki skullu vera dømd saman við hesum heimi, teimum sum hava vraka frelsuna, tann dómin tók Jesus á seg tá Hann doyði fyri okkum, einaferð fyri allar.

Men vit skullu vera dømd og lønt eftir hvussu vit hava hepnast við okkara andaliga lívi !!

Guds orð talar nógv um løn og verk eftir at vit eru blivin frelst.

Rómbrævi 4:4-5 sigur:

Tann, ið virkar - honum verður lønin rokna, ikki av náði, men sum nakað, hann eigur á.

Men tann, ið ikki virkar, men trýr…..honum verður trúgv hansara rokna til rættvísi.

Vit eiga at minnast til, at táið skriftin tosar um løn, so er tað ikki frelsan, tí frelsan er ikki løn, hon er av náði einans, ein náðigáva, vunnin okkum við Jesusar dýrabara blóði.

Men lønina fáa vit alt eftir hvussu vit hava roynst sum húshaldarar og tænarar Guds, og eftir , um vit hava gjørt tað sum okkum var álagt! At vit eru ónyttugir tænarar er so púra vist, og tað eigur eisini at vera okkara eymýkti holdningur, tí í okkum sjálvum eru vit einki ment at gera, Nei tað er alt av Honum og við Honum

*Við tómum hondum*
*komi eg fram fyri Teg.*
*Tak meg, Harri,*
*nú, og fylg Tú við mær,*
*tí í mær sjálvum*
*eg einki kann,*
*men tá Tú leiðir meg,*
*tá kann eg tæna Tær!*

Les eisini (1.Kor. 4:1-5) og (2 Kor. 5:10)

Hetta er eitt umfatandi evni, og eg havi sjálvur, fyri kortum, fingið ljós yvir mangt av hesum, og tað sjálvt um eg havi veri ein persónligur trúgvandi í skjótt 30 ár. Eg vil uppmuntra teg at lesa tað nýggju bókina "kreftir hins komandi heims" eftir Zacharias Zachariassen, sum forlagi Leirkerið gav út fyrr í ár, hon kann geva tær svær uppá nógv sum kann vera torskilt fyri mong trúgvandi. Hettar er eitt evni sum hevur veri undurvíst alt for líti í, í okkara samkomum kring landi.

Eg havi annars hoyrt fleiri sagt hattar sama sum tú sigur um akkurát handan sangin, men eg haldi at tað er tí at tey misskilja boðskapin. Tað eru mong, sum hava fata sannleikan og gleðina í Gleðiboðskapinum, men sum ikki hava fata sannleikan, gleðina og álvaran í at liva eitt virkið lív, í tænastu fyri Harran, og at vinna sálir fyri Hann. "Sum tú sáar, skalt tú heysta, minst til tað" sigur ein annar sálmur. Jú vit eiga at samla okkum skattir /løn í Himli, tí ein dag skullu vit øll vera lønt eftir verkið, Bíblian sigur, "har sum skattur tín er, verður hjarta títt við". Lat okkum tí hava skattin á røttum stað !

Opinberingin 22:12 sigur:

Eg komi skjótt, og løn Mín er við Mær til at lata ein og hvønn fáa, eftir sum verk hansara er.

So lat okkum koma til Jesus sum tómhentir syndarar, men vit eiga ikki at vera tómhentir tænarar og húshaldarar Guds. Má Hann hjálpa okkum at gera tað sum okkum er álagt ! "at vera íðin í verkið".

Í 1989 var eg í tí
sentimentala hjørninum
og yrkti ein sang um
beiggja mín, sum eg eri
errin av sum
fótbóltsspælara.
Hjartaliga tillukku við
runda degnum 22.9.
**Vit í Fr. Petersensgøtu 5**



# Valdemar

Tú leikti so leikandi lætt á sandinum í meðaldeildini
og árini vóru bara 17 vetrar, men skjótt sást
at hegni og dirvi títt at spæla bólt vóru avbera góð,
og mundu teir sum vóru eldri vera stoltir av tær.

Ongantíð ein sá at reyv tú vendi ímóti nøkrum á vølli,
men beint fram tað gekk og har vóru stengurnar báðar,
mangur ein føroyingur tað sanna má í hesi 20 ár,
at hesin maður má væl passast uppá.

Har frammi tú spældi og væl tað gekk,
tú 17 mál tað eina árið fekk, hvar eru hesir garpar í dag.
Men tað sást at sterkur tú var og so í verjuna
tú koyrdur varð, men somu styrki tú har vísti.

Onkur heldur at tú harður var, men mangur málmaður tað
sanna má, at mongum manni og máli tú í síðstu løtu
mundi steðga, kanska okkurt straffi kom frá tær,
men ikki munnu tey vera so mong sum onkur heldur.

Nú tínir dagar á vøllinum fara at verða taldir,
tú einsamallur ert av teimum gomlu. Vit eru mong,
sum takka tær fyri tann trúskap og tað góða og sterka spæl
tú altíð vísti, gævi at maður kemur í mans stað.

**J. E. á Løgmansbø**

# Skótahjálpin takkar hjartaliga fyri dygga stuðulin

**SKÓTAHJÁLP**
*Tíðindaskriv*

Skótahjálpin læt kr. 40.000,- til hvørja verkætlanina, har onnur fór til ljóðbókaarbeiðið, sum ljóðbókanevndin í Føroyum skipar fyri.

Tað er ein mannarættur at sleppa fram at bókmentum. Tað er hesum mannarætti, sum Skótahjálpin við tygara hjálp hevur stuðlað.

Endamálið hjá ljóðbókanevndini er at røkka so nógvum sjónar- og lesitarnaðum her á landi, sum til ber. Tørvurin er alstórur; talan er um øll í aldrinum frá 1 til 100 ár. Tær 40.000,- krónurnar røkka ikki so langt, men eru tó ein bati, sum vit fegnast um.

Onnur verkætlan hjá Skótahjálpini 2001 var í Afrika. 40.000,- kr. vóru latnar til eitt gentuheim, sum Frelsunarherurin í Noregi stuðlar. Genturnar, sum annar verða illa viðfarnar í støðuni, hava eisini peningaliga hjálp fyri neyðini. Tær eru sera takksamar fyri hjálpina úr Føroyum.

Ein slakur triðingur av Skótahjálpini fór í ein grunn, sum er tøkur til brádliga íkomnar vanlukkur, har børn verða rakt av vanlukkuni.

### Skótahjálpin 2002

Skótahjálpin bankar aftur á dyrnar.

Neyðin er stór um allan heimin, og Skótahjálpin fer aftur í ár til verka í góðum treysti.

Skótahjálpin kann einans verða sum ein dropi í havinum, men tað ber ikki til bara at setast hendur í favn og spyrja: »Hvat nyttar tað sindri, sum Skótahjálpin er før fyri, tá ið hugsað verður um alla neyðina, sum leikar á um allan heim«.

Hóast henda kunnleika um ta neyð, ið leikar um allan heim, fer Skótahjálpin til verka í tí treysti, at øll hjálp er til bata.

Skótahjálpin veit eisini, at um tygum ikki taka undir við teimum tiltøkum, ið vit kunnu hjálpa tygum við, so verður eingin Skótahjálp. Tí takka vit tygum, sum taka ímóti okkara tilboði um at hjálpa tygum við einumhvørjum, hjartaliga fyri vælvildina.

Um eitthvørt er áfatt hjá tygum, so eru skótarnir fúsir at hjálpa tygum við tí. Tað ræður um, at skótin sleppur at gera eitthvørt, sum viðkomandi fær eina samsýning fyri.

Endamálið er, at frísk børn hjálpa sjúkum børnum. Tað eru frísk og ferðug børn, ið vilja stuðla og hjálpa neyðstøddum, sjúkum annars illa støddum børnum ungum bæði her á landi og úti í heimi.

Skótahjálpin vil fegin verða *tann bøtandi hondin*.

Hetta er 19. ferðin, at tær fýra skótasamskipanirnar: FH-skótarnir, Føroya Skótasamband, KFUK- og KFUM-skótarnir, sum aftur í ár skipa skótahjálpina.

Skótahjálpin í ár 2002 er ætlað at fara til tvær verkætlanir, eina heima á landi og eina úti í heimi. Harumframt fer í mesta lagi ein triðingur í grunn, sum Skótahjálpin umsitur.

Verkætlanin heima á landi er ætlað sum stuðul til at útvega Leika- og Hugskotssavninum, ið er tengt at Sernámsdeplinum, miðlar, so at avvarðandi at brekaðum børnum og onnur viðkomandi kunnu fáa at komu at ymiskum miðlum, sum kunnu menna tað brekaða barnið í gerandisdegnum.

Leika- og Hugskotssavnið er eitt neyðugt vitanarsavn, ætlað brekaðum børnum og viðkomandi, sum eru um tey brekaðu børnini, so at tey kunnu kenna ein lætta í gerandisdegnum.

Skótahjálpin hevur samtykt at veita Leika- og Hugskotssavninum fíggjarligan stuðul til tess at útvega savninum viðkomandi miðlar.

Útlendska verkætlanin er ætlað at stuðla **Gøtubørnum í Kiev**. Tað eru tíverri nógv børn, sum mugu liva á gøtuni bæði nátt og dag. Foreldrini hava slept ábyrgdini. Summi teirra sleppa møguliga at sova heima, men um dagin mugu tey liva á gøtuni og sjálvi finna sær eitthvørt til matna.

Jórun Fonsdal, sum býr í Kiev og gift manni haðani, virkar millum gøtubørnini í Kiev, Jórun og maðurin royna eftir førimuni at hjálpa hesum børnum, ið vanliga eru 9-15 ára gomul.

Arbeiðið millum gøtubørnini krevur nógv av teimum báðum. Tey hava útvega børnunum eitt dagskýli, har tey kunnu verða tríggjar dagar um vikuna.

Skótahjálpin hevur samtykt at veita teimum báðum fíggjarligan stuðul, so at tey kunnu keypa undirvísingarmiðlar til dagskýlið.

# 17.08.2002 Leygardagur

Vanafull leiðin mín her
góðveðursmorgunin snimma
bakaradyrnar standa víðopnar nú
framm stundar sær móti fimm her
summarsins løtur á morgni ein sær
nú lýsir for degi og minni -

Fækkast á gøtuni - javnaldrar mín
hvør er hin næsti í rekkju
eingin er megnaður siga til tín
dagur er taldur - hygg eftir
útsjónd og aldur ei skobráði gav
við líggjanum kom hann hin sterki -

Vit sita eftir sum dumbur á ból
gálva og stæra í loftið
hvar fara Hanus- Janus og Pól
Anna - Jana - Cornetta
Takk fyri lívið og vinirnar her
skrivað tað stendur eftir!

**Albert**